Fiskivinnu- og samferðslumálaráðið
Yviri við Strond 15
Postboks 347
FO-110 Tórshavn

JFK
Kósarbrúgvin 3
P.O. Box 56
FO-710 Klaksvík
Faroe Islands
Tel +298 409900
Fax + 298 409901
jfk@jfk.fo

Klaksvík, tann 20/01 -2025

**Hoyringsskriv í sambandi við uppskot til løgtingslóg um broyting í sjófeingislógini**

Hetta hoyringsskrivið er skrivað vegna P/F JFK/JFK Trol, P/F Næraberg og P/F Kósina.

JFK/JFK Trol og Næraberg eru limur í Føroya Reiðarafelag, og Fiskivinnu- og samferðslumálaráðið fær eisini hoyringsskriv frá Reiðarafelagnum. Hetta skrivið snýr seg tí serliga um tey árin, sum nýggja lógaruppskotið beinleiðis hevur á raksturin hjá okkara feløgum.

Vit gera tí fyrst og fremst viðmerkingar um reglurnar um miðsavnan, reglurnar um hugtakið "nærstandandi", umframt reglurnar um útlendskan ognarskap.

## Inngangur

Vit hava gjøgnum árini lagað okkara virksemið til verandi lóggávu í eini roynd at fáa raksturin so góðan sum gjørligt. Hetta hevur serliga verið avbjóðandi fyri Kósina og virksemið rundanum Kósina, tvs. heimaflotan. Eftir stóru broytingarnar í fiskiveiðilóggávuni í 2018 og aftur í 2020 høvdu vit eina vón um, at rammurnar um fiskivinnuna fóru at verða varandi. Vit høvdu tí treysti at gera stórar íløgur, m.a. í nýggja Gadus, eins og vit fyri at tryggja rávøru til Kósina, hava gjørt íløgur í skip í heimaflotanum, eins og aðrar íløgur.

Vit hava hildið, at viðurskiftini frá almennu myndugleikunum nú lógu nøkulunda føst, og tað kom tí dátt við at síggja nýggja lógaruppskotið, sum nú er til hoyringar.

Sagt verður, at verandi feløg kunnu halda fram, hóast tey eru omanfyri miðsavningarmørkini, men tað er beinleiðis skeivt. Okkara feløg eru omanfyri markið, og hjá okkum verður neyðugt at byrja eina tillaging

JFK
Kósarbrúgvin 3
P.O. Box 56
FO-710 Klaksvík
Faroe Islands
Tel +298 409900
Fax + 298 409901
jfk@jfk.fo

rættiliga skjótt, so samtøkini lúka nýggju krøvini um loyvdar eigarapartar av rættindunum, tá tað verður neyðugt, at eigaraskifti fer fram, td. í sambandi við arv.

Ein slík tillaging hevur við sær, at samtakið má avhenda rættindi, sum so hevur við sær, at grundarlagið undir rakstrinum versnar munandi. Tí verður neyðugt at selja verandi skip "Gadus" og í staðin keypa eitt bíligari skip, sum fíggjarliga kann liva av minnu kvotuni, umframt at P/F Kósin og skipini, sum eru knýtt til Kósina, mugu tillagast og seljast. Vit vænta ikki, at samtakið, tá tað er minkað til komandi lógarkarmar, klárar at halda Kósina opna.

Á kunningarfundinum, sum Fiskivinnu- og samferðslumálaráðið skipaði fyri 10 januar 2025, varð eisini víst á nøkur viðurskifti, sum seinastu tíðina eru broytt tann skeiva vegin fyri fiskivinnuna; nøkur eru komin uttanífrá, men tey flestu eru áløgd okkum av Løgtinginum.

Nevnast kann m. a.:

- Kvotan í Barentshavinum minkar munandi, samstundis sum tilfeingisgjaldið hækkar,
- TAC'ið fyri makrel í 2025 minkar 22 %,
- Føroyska mkrelkvotan fer frá 19,6 % til 12 % av TAC'num,
-
- Tilfeingisgjaldið fyri makrel meir enn trýfaldast úr 1,45 kr./kg upp í 4,50 kr./kg,
- Tilfeingisgjald er lagt á línuskip og partrolarar,
- Sildakvotan minkar munandi,
- Gildistíðin fyri fiskiloyvir varð sett til 12 ár, men er nú 9 ár og styttist støðugt,
- Skatturin, tá fiskirættindi verða avhend, er nú 50 %, umframt 18 % av restini.

Tá hetta uppskotið nú verður lagt fram, har enn fleiri forðingar verða lagdar á okkum, m.a. herdar reglur um miðsavnan, bæði at mørkini verða lækkað og útrokningargrundarlagið verður hert, er hetta sum steinur oman á byrðu. Vit fáa ta fatan, at tann samgongan, sum í dag situr við valdið, veruliga ynskir at bróta niður tað, sum vit og eisini onnur feløg í fiskivinnuni hava brúkt áratíggju at byggja upp. Tó tað tykist sum samgongan ikki er samd við okkum, so meta vit, at tað samtak, vit hava

stríðst við at byggja upp her í Norðoyggjum, hevur verið til stórt gagn fyri økið her norðuri og alt Føroya land.

JFK
Kósarbrúgvin 3
P.O. Box 56
FO-710 Klaksvík
Faroe Islands
Tel +298 409900
Fax + 298 409901
jfk@jfk.fo

**Miðsavnan av veiðirættinum**

Reglur um miðsavnan í føroyskari fiskivinnu hava verið galdandi í mong ár, men nú reglurnar verða herdar munandi úr 25% niður í 15% í øllum bólkum, undantikið 35% til 25% í Barentshavinum, raka hesar broytingar bæði tann part, sum hvør einstakur kann ráða yvir, umframt at hugtakið "nærstandandi", ið er grundarlagið undir útrokningini í samband við miðsavnan, verður hert munandi og tískil ávirkar atknýtt feløg og minnilutaeigarar í hesum samtøkum.

Nýggi útrokningarhátturin viðvíkjandi miðsavnan rakar okkum her norðuri nógv harðast. Vit hava søguliga altíð havt nógv størsta partin av rættindunum í Barentshavinum. Síðani reguleringin av fiskirættindum byrjaði seinast í 70-unum, hava vit havt tann partin, sum vit í dag hava, men ætlanin er nú at skerja okkum niður í helvt. Hetta er serliga hugstoytt.

Í veruleikanum raka reglurnar munandi harðari enn tey nýggju mørkini, tí nýggju reglurnar um miðsavnan hava við sær, at hugtakið "nærstandandi" verður víðkað munandi.

Sum dømi kann nevnast, at tó at Hanus Hansen eigur umleið 10 % í "Klakki", "Jákup B" og "Pison", verður hann eftir nýggju reglunum mettur at hava ávirkan fyri 100 %.

Uppskotið rakar ikki bert okkum høvuðspartaeigarar, sum ætlanin helst er, men fer í stóran mun eisini at raka teir minnilutapartaeigarar, sum hava gjørt íløgur saman við okkum.

*Generelt um miðsavnan í føroysku fiskivinnuni*

Tað tykist, sum um fatanin hjá verandi samgongu og politikarum annars er, at tað er skaðiligt fyri føroyska samfelagið, um tað ikki eru nógvir aktørar í fiskivinnuni. Hendan hugsanin kann tykjast margháttlig, tá hugsað verður um, hvussu flest aðrar vinnur í Føroyum eru skipaðar, og hvussu politikkarar undir kreppuni vildu hava færri skip fyri at styrkja vinnuna.

Stórt sæð allar aðrar vinnur, sum eru avgerandi fyri samfelagið, eru nevniliga skipaðar við heilt fáum stórum feløgum, sum kappast sínámillum.

Í alivinnuni eru trý feløg, sum eiga øll aliloyvini. Í flutningsvinnuni eru trý feløg, sum standa fyri øllum flutningi til og úr Føroyum, í oljuvinnuni eru tvey feløg, sum selja øllum føroyingum olju, tó at eitt minni felag nú er komið, sum bert selur til skip, í fjarskiftisvinnuni eru tvey feløg, og innan matvøruhandlar eru eisini heilt fá feløg, sum eiga stórt sæð allar handlar í

JFK
Kósarbrúgvin 3
P.O. Box 56
FO-710 Klaksvík
Faroe Islands
Tel +298 409900
Fax + 298 409901
jfk@jfk.fo

Føroyum, kanska trý stór feløg/samtøk. Í bankavinnuni eru tveir stórir bankar, sum sita stórt sæð á øllum inn- og útlánum í Føroyum, hóast tveir aðrir smærri sparikassar eru, eins og tað í tryggingarvinnuni eru tvey feløg, sum tryggja okkum føroyingar.

Tað, sum serliga undrar okkum, er tann munur, sum verður gjørdur á alivinnuni og fiskivinnuni, tá hugsað verður um miðsavnan.

Eftir okkara hugsan áttu hesar báðar vinnurnar, sum báðar eru loyvisvinnur, at havt eins treytir, bæði tá tað snýr seg um tilfeingisgjøld, og tá tað snýr seg um reglur at virka undir. Tað tykist tí sera undranarvert, at fiskivinnan skal syndrast í so nógvar eindir sum gjørligt, meðan alivinnan eftir galdandi reglum er átt av trimum feløgum.

Tað tykist løgið, at fatanin skal vera, at bara fiskivinnan á sjónum er soleiðis háttað, at hon skal verða á fleiri og fleiri hondum.

Eftir okkara meting er hesin hugsanarháttur ikki til frama fyri samfelagið. Íløgur í kappingarfør fiskifør eru kapitalkrevjandi íløgur, har neyðugt er við sterkum feløgum. Eins og í øðrum vinnum halda vit, at tað er avgerandi, at eisini í fiskivinnuni eru stórir aktørar, sum hava ráð at gera íløgur. Síðstu árini eru stórar íløgur gjørdar í fiskivinnuni, og høvdu hesar allarhelst ikki verið framdar, um feløgini hvør sær vórðu so lítil, sum lagt er upp til við hesum lógaruppskoti.

Sum dømi kann nevnast, at vit helst ikki høvdu havt eitt stórt uppisjóvarvirki á Tvøroyri og eitt stórt virki í Fuglafirði, um eigararnir aftanfyri ikki vóru fíggjarliga sterkir. Tað hevur eisini verið grundarlagið undir flakavinnuni á landi, bæði í Runavík og í Klaksvík, at eigararnir eru stór feløg.

Tað er eftir okkara meting rættuliga ivasamt, um tað fer at bera til áhaldandi at halda hesar vinnur gangandi, um feløgini verða so lítil, sum landsstýrið leggur upp til. Um hesi virkir eru opin, er kanska líka mikið í høvuðsstaðnum, men her norðuri hjá okkum og eisini í Runavík hevur tað sera stóran týdning, at flakavirkini eru opin. Bæði fyri tey, sum starvast har, og ikki minni fyri allar veitarar til virkini og tey skip, sum avreiða til virkini. Talan er um heilsølur, smiðjur, skipasmiðjur umframt aðrar veitarar.

Tað er í lógaruppskotinum ført fram, at verandi aktørar hava rætt til at varðveita sín ognarpart, men hetta er eftir okkara meting beinleiðis skeivt. Sum víst verður á niðanfyri, hava nýggja lógaruppskotið og nýggju reglurnar um miðsavnan við sær, at stórt sæð øll tey størru fiskivinnufeløgini í Føroyum verða omanfyri mørkini.

JFK
Kósarbrúgvin 3
P.O. Box 56
FO-710 Klaksvík
Faroe Islands
Tel +298 409900
Fax + 298 409901
jfk@jfk.fo

Tað er ongin ivi um, at tað fer at tarna raksturin nógv, at feløgini í strembanini eftir at skipa ein fleksiblan rakstur hava avmarkaðan møguleika at flyta fiskirættindi (kvotur ella fiskidagar) millum sín.

Eftir okkara meting er talan um ov stór inntriv í rættindini hjá verandi eigarum, sum verða omanfyri markið, og at uppskotið fer ov langt í inntrivinum í ognarrættin og rættindini, sum verandi eigarar hava, m.a. at teir ikki kunnu selja síni partabrøv frítt, at ognarparturin skal niðurlagast, hvørja ferð broytingar fara fram, og at avmarkingar verða í arvarættinum hjá teimum, sum eru omanfyri markið.

Á framløgufundinum hin 10. januar førdi Fiskivinnu- og samferðslumálaráðið í fleiri førum fram, at tær reglur, sum vit vístu á fóru at verða neiligar fyri vinnuna, í stóran mun eru galdandi frammanundan. Hetta halda vit er skeivt, tí tað fer at gera ávirkanina munandi meira neiliga í samband við raksturin, at mørkini lækka, og at hugtakið "nærstandandi" verður víðkað, tí reglurnar um miðsavnan fara at raka stórt sæð øll tey stóru feløgini, og í hvussu so er øll feløgini her norðuri hjá okkum.

*Reglurnar um miðsavnan fyri JFK, Næraberg og Kósina*

Hetta yvirlitið vísir, hvørja ávirkan nýggju reglurnar hava á okkara samtøk í Klaksvík:

| **Hanus Hansen (Beinleiðis og óbeinleiðis ognarpartur):** | **Galdandi lóg %** | **Lógaruppskotið %** |
|---|---|---|
| JFK, JFK Trol og Kvikk | 34,27 | 100 |
| Næraberg, Meðalsbrekka og 02.12.2023 | 66,67 | 100 |
| Kósin og GPS | 18,19 | 100 |
| Polarstjørnan | 33,49 | 100 |
| EFHO | 10,91 | 100 |
| Klakkur og Miðdalsenni | 9,28 | 100 |

Sum sæst, hava nýggju reglurnar, um tær verða samtyktar, við sær, at hóast Hanus Hansen bert eigur ein lítlan part í flestu atknýttu feløgum, verða øll rakt av reglunum um miðsavnan. Minnilutaeigarar verða sostatt eisini 'revsaðir' fyri at samstarva við størri aktørar í vinnuni.

*Møguleikar at flyta rættindi millum feløg*

Nýggja lógaruppskotið ásetir eins og verandi lóg, at feløg, sum eru omanfyri markið, kunnu halda áfram við verandi virksemi, men kunnu tó ikki vaksa. Avleiðingin av nýggju ásetingunum um nærstandandi partar hevur tó við sær, at hesi feløg nú eisini fáa fleiri trupulleikar í dagliga rakstrinum, tí tá talan ikki er um eitt samtak, har sami eigari eigur allan partapeningin, hevur einhvør flyting av fiskirættindum millum feløgini í

JFK
Kósarbrúgvin 3
P.O. Box 56
FO-710 Klaksvík
Faroe Islands
Tel +298 409900
Fax + 298 409901
jfk@jfk.fo

sama samtaki við sær, at partar vaksa hjá onkrum eigara, og harvið ber hendan flyting av fiskirættindum ikki til.

Hetta hevur rættuliga stóra neiliga ávirkan í dagliga virkseminum, har tað, sum tað helst er tykkum kunnugt, ofta er neyðugt ella ynskiligt at flyta fiskidagar ella kvotur millum feløg í eini roynd at optimera raksturin.

Sum dømi kann nevnast, at línubátarnir, sum P/F Kósin eigur meirilutan av, í stóran mun verða darvaðir at kunna flyta fiskirættindir sínámillum, tí ognarviðurskiftini eru ikki eins í øllum feløgunum.

So vítt vit hava skilt í samskifti við Fiskivinnu- og samferðslumálaráðið, er ætlanin við lógaruppskotinum m.a., at tað ikki skal bera til at flyta fiskirættindi millum feløg, har ein persónur ella felag hevur avgerandi ávirkan á bæði feløgini, um móttakari ella persónur er omanfyri miðsavningarmørkini. Í sambandi við lógaruppskotið, hoyringina ella viðgerðina av uppskotinum, er neyðugt at tað verður avklárað:

- Ber til at flyta fiskirættindi frá einum felagi til annað - um hetta er neyðugt ella ynskiligt í vanliga rakstrinum - um sami eigari hevur avgerandi ávirkan á bæði feløgini, og hann er omanfyri miðsavningarmørkini?

- Er nakar munur á svarinum, um ognarskapurin hjá tí, sum hevur avgerandi ávirkan á bæði dótturfeløgini, eigur ymist í báðum feløgunum?

*P/F Kósin og miðsavnan í heimaflotanum*

Tað tykist serliga margháttligt og óskiljandi, at lógaruppskotið eisini leggur upp til, at miðsavningarreglurnar skulu herðast í heimaflotanum.

Vit halda, at tað er øllum, sum hava minsta innlitið í hendan partin av fiskiflotanum, kunnugt, at serliga her hevur tað havt avgerandi týdning, at stór og sterk feløg hava verið før fyri og hava havt áhuga í og vilja at gera íløgur í skipini.

Av politikarum í verandi samgongu eru vit skuldsettir fyri at hava "gjørt okkum dælt av" verandi reglum um miðsavnan við at fáa hendur á einum parti av heimaflotanum, og tað hevur verið ført fram at vera ein orsøk til uppskotið um herdu miðsavningarreglurnar.

Til hetta vil eg siga, at okkara íløgur í heimaflotan bert hava verið gjørdar við einum endamáli, nevniliga at fáa rávøru til Kósina.

Flakavirkið Kósin hevur verið í okkara samtaki í mong ár, fyrst frá 1998-2006 og síðani frá 2009 til í dag. Fyri mongum árum síðani vóru tað stórt sæð bert línuskip, sum avreiddu til Kósina, men hetta broyttist, tí nøgdin

JFK
Kósarbrúgvin 3
P.O. Box 56
FO-710 Klaksvík
Faroe Islands
Tel +298 409900
Fax + 298 409901
jfk@jfk.fo

av toski og hýsu minkaði so nógv, og tí var neyðugt at fáa til vega upsa. Tað var orsøkin til, at farið var undir at fáa trolarar til Klaksvíkar.

Harumframt eru íløgur gjørdar í meira nýmótans frystilínuskip. Hesar íløgur hava vit gjørt saman við teimum monnum, sum framman undan vóru í hesi vinnu, og samstarvið hevur verið fyrimyndarligt.

Serliga her raka nýggju miðsavningarreglurnar hart, tí tær fara at hava við sær, at dagligi raksturin av skipunum og virkinum á landi fer at verða nógv truplari, hóast støðan í veruleikanum er tann, at Hanus Hansen eftir nýggju reglunum verður mettur at hava ræðið á øllum samtakinum, tó hann bert eigur millum 10 og 33% av teimum feløgum, sum reka línuskipini. Viðv. rakstrinum er eisini at siga, at Hanus Hansen á ongan hátt hevur fult ræði á dagliga rakstrinum, tí línuskipini nú sum fyrr fyrst og fremst verða rikin av minnilutapartaeigarum, sum eru skiparar á skipunum. Okkara samtak stendur einans fyri sølu av fiskinum eftir avtalu við skiparar og minnilutaeigarar.

Serliga raksturin av Kósini og av partrolarunum, sum landa til Kósina, hava seinastu árini verið sera tungir og hava givið hall. Vit vænta tí, at hesar nýggju reglurnar um miðsavnan fara at gera raksturin upp aftur tyngri. Avleiðingin av hesum verður, at hesin parturin av okkara virksemi fer at verða niðurlagaður og møguliga steðgaður.

**Fiskiveiðiavtala við onnur lond, herundir við Russland**

Í kjakinum um fiskiveiðiavtaluna við Russland hevur verið nevnt, at um Føroyar velja ikki at gera avtalu við Russland, skulu tey skip, sum í dag hava kvoturnar í russiskum sjógvi, fáa tann uppsjóvarfisk, ið Føroyar vanliga hava latið Russlandi í býtið fyri kvoturnar.

Sum reglurnar um miðsavnan eru orðaðar í lógaruppskotinum, verða tær uttan iva ein forðing fyri, at í hvussu so er tvey av hesum reiðaríunum í Barentshavinum kunnu fáa hesar uppisjóvarkvoturnar í býti.

Tí fara vit at mæla til - um uppskotið verður lagt fram - at ásett verður í sjófeingislógini, at um Føroyar ikki gera fiskiveiðiavtalu við Russland, skal landsstýrismaðurin lata skipunum, ið hava rættindi at fiska í russiskum sjógvi, uppsjóvarkvotur javnt við tær nøgdir, sum Føroyar vanliga hava latið Russlandi fyri fiskirættindini í russiskum sjógvi.

Samstundis mugu reglurnar um miðsavnan verða tillagaðar, so miðsavningarmarkini ikki verða ein forðing fyri at lata skipunum uppsjóvarkvoturnar.

Sami trupulleiki er uttan iva eisini galdandi í sambandi við fiskiveiðiavtalu við onnur lond enn Russland.

JFK
Kósarbrúgvin 3
P.O. Box 56
FO-710 Klaksvík
Faroe Islands
Tel +298 409900
Fax + 298 409901
jfk@jfk.fo

**Ber til hjá arvingum at arva partabrøv frá persónum, sum eru oman fyri markið fyri miðsavnan?**

Eftir reglunum um "nærstandandi" verða hjúnafelagi, skild í stígandi ella fallandi linju, og systkin m.a. roknað við, tá talan er um miðsavnan. Hetta vil siga, at um ein persónur eigur meira, enn markið fyri miðsavnan er, er avleiðingin, so vítt vit duga at síggja, at t.d. hjúnafelagin og/ella lívsarvingar hjá viðkomandi ikki kunna arva partabrøvini, um/tá viðkomandi doyr, tí tey verða øll roknað saman undir einum, tá talan er um miðsavnan, og arvingar kunnu ikki trína inn í stað arvalatarans.

Um hetta er rætt skilt, er talan um eina grundleggjandi avmarking av ognarrættinum hjá viðkomandi familju, og broytingin er í stríð við allar aðrar vanligar reglur í sambandi við arv, t.d. reglur í skattalóggávuni, har arvingar ikki rinda skatt av partabrøvum, sum annars hevði verið galdandi, men arvingarnir trína inn í somu rættarstøðu sum arvalatarin.

Eftir okkara meting er hetta, at arvingar ikki verða skerdir í samband við arv, ein grundleggjandi rættarfatan hjá føroyingum.

Vit mæla tí til, at um verandi uppskot verður samtykt, verður undantak gjørt í sambandi við arv til hjúnafelagar og lívsarvingar.

Hendan grundleggjandi broytingin er eftir okkara meting í stríð við grundlógartryggja ognarrættin. Um partabrøv mugu seljast, er fíggjarliga avleiðingin orsaka av eykaskattinum, sum er galdandi, sera stór, og fyritøkurnar kunnu verða syndraðar.

Hesar avmarkingar í sambandi við arv, kunnu eisini hava við sær at neyðugt verður at byrja eina tillaging beinanvegin.

**Møguleikin at keypa egin partabrøv**

Ein spurningur, sum hevur verið reistur í samskiftinum við Fiskivinnu- og samferðslumálaráðið um lógaruppskotið, er, um miðsavningarreglurnar hava við sær, at tað ikki ber til hjá feløgum, sum eru oman fyri miðsavningarmørkini, at keypa egin partabrøv frá partaeigarum, sum ynskja at selja.

Sum vit hava skilt hetta samskiftið, ber tað ikki til.

Um hetta ikki ber til, er talan um eina forðing, sum ger tað rættuliga trupult hjá partaeigarum í fiskivinnufeløgum at selja síni partabrøv sammett við aðrar vinnur, har tað er vanligt og rættiliga nógv brúkt, at feløg keypa egin partabrøv frá partaeigarum, sum ynskja at selja. Avleiðingin er, at tað gerst munandi dýrari, um so er, at partaeigararnir í feløgunum skulu keypa partabrøvini, heldur enn at feløg sjálv keypa partabrøvini, og tað hevur við sær, at óneyðuga nógvir pengar mugu takast burturúr fiskivinnufeløgunum, pengar sum annars kunnu verða brúktir til nýíløgur

JFK
Kósarbrúgvin 3
P.O. Box 56
FO-710 Klaksvík
Faroe Islands
Tel +298 409900
Fax + 298 409901
jfk@jfk.fo

og rakstur. Feløg í fiskivinnuni verða sostatt frátikin einum møguleika í sambandi við umskipan, sum annars er vanliga nýttur í allari vinnu.

## Útlendskur ognarskapur

Broytingin í lógaruppskotinum er sum kunnugt, at útlendingar ikki hava rætt at keypa partabrøv í feløgum innan fiskivinnuna. Munurin í mun til galdandi reglur er sostatt, at forboðið hjá útlendingum at koma inn í fiskivinnuna verður sett í gildi longu 1. juli 2025, og ikki 1. januar 2032, sum sjófeingislógin nú ásetir.

At útlendingar ikki skulu eiga í føroyskari fiskivinnu, og at allur útlendskur ognarskapur skal verða úr fiskivinnuni seinast 1. januar 2032, er eftir øllum at døma ein fatan, sum føroyskir politikarar hava, men vit skulu hóast tað gera nakrar generellar viðmerkingar til útlendskan ognarskap í fiskivinnuni.

At útlendingar ikki hava rætt at eiga ein minniluta í føroysku fiskivinnuni, tykist serliga margháttligt, tá hugsað verður um, at løgtingið hevur loyvt útlendingum at eiga mest sum alla alivinnuna í Føroyum, og at eingin spurningur verður settur við tað.

Eftir okkara meting hevur tann ognarskapur, sum seinastu árini hevur verið í føroyskari fiskivinnu, havt sera jaliga ávirkan á føroyska samfelagið, eins og útlendskur ognarskapur helst eisini hevur havt jaliga ávirkan á alivinnuna.

Fyri okkara viðkomandi byrjaði samstarvið við útlendingar, tá vit eftir áheitan frá Føroya Landsstýri í seinnu helvt av ’90-unum fóru undir eina sera stóra surimi-verkætlan saman við norðmonnum. Tann verkætlanin hevði tíverri stórt hall og varð eftir nøkrum árum steðgað, men samstarvið við teir útlendingar, sum tá áttu í, og sum seinni seldu sín part til hollendska felagið P.P., helt tíbetur fram, og hevur verið mennandi fyri samtakið.

Sum dømi um samstarv við útlendingar kann nevnast, at tað bert við hjálp frá útlendskum íleggjarum lat seg gera at lata flakavirkini á landi uppaftur, eftir at tey vórðu latin aftur í kreppunum, sum hava verið. Hvørki hjá Faroe Origin ella hjá Kósini var gjørligt at fáa nóg nógvar føroyskar íleggjarar, og tí var bjóðað útlendingum at seta pengar í feløgini handan virkini. Beinleiðis íløgurnar í Kósina og Faroe Origin á landi eru ikki fevndar av forboðnum í lóg um sjófeingi, men ein fortreyt hjá útlendsku íleggjarunum fyri hesum íløgunum var, at tað samstundis bar til at fáa rávøru til virkini. Tí var neyðugt, at feløgini eisini samstundis settu pengar í skip, sum vórðu og eru knýtt at virkjunum.

Harumframt var útlendski parturin í P/F Næraberg avgerandi fyri, at uppsjóvarvirkið í Kollafirði lat upp aftur, og var bygt á vitan frá hollendsku

JFK
Kósarbrúgvin 3
P.O. Box 56
FO-710 Klaksvík
Faroe Islands
Tel +298 409900
Fax + 298 409901
jfk@jfk.fo

minnilutaeigarunum í P/F Næraberg. Eftir at føroysku aktørarnir í uppisjóvarvinnuni høvdu sæð, at tað bar til at virka uppsjóvarfisk á landi í Føroyum, varð virkið á Tvøroyri eftirfylgjandi bygt, og seinni kom eisini Pelagos í Fuglafirði. Tað er okkara meting, at tað var vitanin frá útlendskum íleggjarum í føroysku fiskivinnuni, sum slóðaði fyri hesi vinnu, sum síðani hevur havt alstóran týdning fyri føroyska búskapin.

Harumframt kann eisini nevnast, at orsøkin til, at føroyingar í dag eiga flutningsfelagið P/F Smyril-Line og frálandafelagið P/F Skansi Offshore, er eitt fiskivinnusamstarv, sum kom í lag, eftir at norski reiðarin Per Sævik hevði sett pengar í skipini hjá Osmundi Justinussen í Leirvík. Harvið komu í lag sambond, sum seinni høvdu við sær íløgurnar í P/F Smyril-Line og Skansa Offshore, íløgur sum annars ikki høvdu komið í lag.

Útlendingar skulu eftir verandi lóg verða úr fiskivinnuni 1. januar 2032. Um hesar reglur ikki verða broyttar, er sostatt neyðugt hjá hesum útlendingum innan nevnda dag at selja síni partabrøv.

Sum víst á oman fyri undir brotinum um miðsavnan, ber ikki til hjá føroysku feløgunum, har útlendingarnir eiga í, at keypa hesi partabrøv (egin partabrøv), eins og verandi partaeigarar ella nærstandandi teirra heldur ikki hava møguleika at keypa hesi partabrøv, um feløgini ella ein partaeigari eru oman fyri ella koma upp um mørkini um miðsavnan.

Vit halda tað er sera óheppið, at føroyingar krevja, at útlendingar, sum í góðari trúgv hava gjørt sínar íløgur í Føroyum, skulu selja síni partabrøv, samstundis sum man politiskt í stóran mun hevur valt at gera tað ógjørligt hjá hesum útlendingum at selja sínar ognarlutir til samstarvsfelagar og onnur fyri rættan prís.

Hetta kann fara at hava við sær rættarmál um óheimilaðar avmarkingar í ognarrættinum, og at føroyingar koma í sera ringt ljós uttanlands í teimum londum, har hesi feløg eru heimahoyrandi.

Vit mæla tískil til, at ásetingar um útlendingar ikki vera herdar, men at man heldur velur at síggja møguleikar í samstarvinum við útlendingar.

**Nýggj skipan fyri økt tilfeingi av uppisjóvarfiski.**

Vit vænta, at Reiðarafelagið og helst eisini Felagið fyri Nótaskip fara at gera viðmerkingar til hendan partin av uppskotinum, men vit skulu bara vísa á, at tey rættindi, sum P/F Næraberg í dag eigur, eru keypt fyri fleiri hundrað milliónir krónur í sambandi við, at P/F Næraberg hevur keypt níggju skip við loyvum og rættindum, sum síðani eru løgd saman til tey rættindini, sum í dag eru í felagnum og verða gagnnýtt av tveimum uppsjóvarskipum. Tá vóru ongar menningarkvotur, ískoytiskvotur, kvotur til serstøk skipakeyp og til vinnuligar royndir og verkætlanir.

JFK
Kósarbrúgvin 3
P.O. Box 56
FO-710 Klaksvík
Faroe Islands
Tel +298 409900
Fax + 298 409901
jfk@jfk.fo

Við lógini um fyrisiting av sjófeingi frá desember 2017 tók landstýrið umleið 35 % av svartkjafti, 25 % av norðhavssild, 25 % av makreli og 18 % av botnfiskinum í Barentshavinum frá táverandi feløgum.

Vit hava so í 2018 og 2019 keypt rættindir aftur fyri stórar upphæddir á uppboðssølu, sum Landstýrið skipaði fyri.

Tí tykist tað rættuliga hugstoytt, at nýggja lógaruppskotið leggur upp til, at vit eru avskorin frá at fáa lut í uppisjóvarkvotunum, ið eru oman fyri tey mørk, sum lógaruppskotið ásetir.

**Skiftisreglur**

Tann bygnaður, sum samtak okkara hevur í dag, er komin av mongu broytingunum í lógini gjøgnum árini, og er samtakið bygt upp við støði í teimum reglum, sum hava verið galdandi, eisini viðv. miðsavnan. Tann síðsta stóra broytingin var, at loyvi vórðu givin við 12-ára freist, ein freist sum nú er stytt niður í 9 ár. Tað er tí óskiljandi, at lógarásetingarnar aftur nú skulu broytast so grundleggjandi, bæði viðv. miðsavnan og viðv. býti av øktum tilfeingi í einum tíðarskeiði, har man politisk áður hevur veitt trygd fyri 12 ára tíðarskeiði, nú 9 ár.

Tað hevur ofta verið rættuliga trupult at greiða útlendskum fíggingarstovnum frá teimum skiftandi reglum, sum seinastu árini hava verið samtyktar at galda fyri føroysku fiskivinnuna. Vit eru stúrin um, at hesar nýggju reglurnar, sum hetta lógaruppskotið leggur upp til, fara at gera møguleikarnar at fáa lán til nýggjar íløgur uppaftur truplari, og um heilt illa vil við, kunnu verandi lán verða uppsøgd.

Tað, sum vit vænta, er, at fíggingarstovnar serliga fara at seta spurnartekn við, at grundleggjandi reglur verða broyttar við so stuttari freist.

Vit fara tí at mæla til, at um partar av lógaruppskotinum vinna frama, verða skiftisreglur gjørdar fyri 10 ár.

Vit halda at tað er óðamannaverk, at so ógvusligar broytingar, sum ávirka so ógvusliga fyri so nógv feløg, koma í gildi frá degi til dags. Hetta fer á ongan hátt at tæna føroyska samfelagnum, heldur tvørturímóti.

JFK
Kósarbrúgvin 3
P.O. Box 56
FO-710 Klaksvík
Faroe Islands
Tel +298 409900
Fax + 298 409901
jfk@jfk.fo

**Niðurstøða**

**Okkara vón er, at alt uppskotið, sum tað er, verður lagt til síðis.**

Um Landstýrið veruliga ynskir broytingar, eigur at verða byrjað við einum kjaki, har fyrimunir og vansar verða lýstir, áðrenn eitt uppskot verður orðað.

Tað verður sagt, at talan er bara um fimm broytingar, men hesar hava sera týðandi ávirkan á fleiri økjum, sum lýst omanfyri, og mæla vit tískil til:

- At miðsavningarreglurnar ikki vera broyttar, hvørki mørkini, ella útrokningarhátturin,
- At heimild fæst fyri at lata verandi skipum, sum fiska í Barentshavinum, uppisjóvarrættindini í fiskiveiðiavtaluni við Russland, um avtalan við Russland ikki heldur fram,
- At undantak verður, so tey nærmastu kunnu arva, hóast miðsavningarreglurnar,
- At feløg, sum eru oman fyri miðsavningarmørkini, fáa heimild at keypa egin partabrøv frá minnilutapartaeigarum og útlendingum,
- At meirilutapartaeigarar, sum eru omanfyri miðsavningarmørkini, fáa heimild at keypa partabrøv frá minnilutapartaeigum og útlendingum,
- At ásetingar um útlendskan ognarskap ikki verða herdar
- At skipanin fyri skeivbýti av øktum tilfeingi av uppisjóvarfiski ikki verður sett í verk, ella verður avmarkað í mun til uppskotið,
- At skiftisreglur verða samtyktar, so reglurnar ikki koma í gildi fyrr enn um 10 ár.

Vegna

P/F JFK/JFK-Trol, P/F Næraberg og P/F Kósina.

Hanus Hansen, stjóri.